## DAGSINS MEINING

# Smáttskorin stórmál

Tað liggja sera stórir spurningar fyri framman í føroyska samfelagnum. Fyriuttan støðu okkara mótvegis Danmark, kunnu vit nevna pensiónsmálið, privatiseringarnar og støða okkara til ES og NATO. Hetta eru alt spurningar, ið áttu at staðið ovast á breddanum í almenna kjakinum. Hetta er tíverri ikki so, tí aðrir spurningar taka nógvu orkuna og fyri at nevna ein teirra, so hevur abortmálið fylt dagsskránna nógv og kemur eftir øllum at døma at fylla nógv, nú ein av flokkunum hevur gjørt hetta til sítt merkismál í samgonguni. Hetta er m.a. tí, at lítlu samgonguflokkarnir hava ein profileringstørv, ið ger, at smøl mál alt ov ofta verða tikin fram um stórmálini. Hetta er serliga ein trupulleiki, tá man hevur eina samgongu við smalast møguligum fleirtali. Stórmalini verða tá oftani burtur í ganginum av profileringsmálum.

Spurningurin er, um tað ikki er tíð at gevast við siðinum pr. automatikk at lata einmansflokkar fáa landsstýrisfólk. Tað er í lagi, at smáu flokkarnir fáa ta ávirkan, ið teirra stødd rættvísger, men ikki kann tað verða rætt, at teir skulu yvirumboðast so ógvusligani í landsins stýri. Hví ikki gera sum aðrastaðni og skjóta upp fyri einmansflokkarnar, at teir heldur enn at at fáa landsstýrisumboð, fáa formanssess í onkrari løgtingsnevnd.

Sitandi samgonga hevur ikki gjøgnumslagskraft í stórmálum, tí hon vil altíð balansera á kantinum til misálit, um til dømis flokkur ikki fær sín vilja í einstøkum máli. Vónandi er tað eyðsæð í dag, at tað var eitt mistak, tá samgongan varð skipað við tveimum einmansflokkum, ið fingu hvør sín landsstýrismann. Tað gongur sjón fyri søgn, at stórmálini liggja og bíða, meðan onnur mál, ið als eingin samgongusemja er um, fylla dagsskránna.

Nú er at vóna, at floksformenninir í stóru samgonguflokkunum taka sær um reiggj og umhugsa, hvussu breiðar semjur kunnu røkkast um til dømis ES spurningin, ið gerst meiri og meiri aktuellur fyri hvønn dag, sum fer. Hetta krevur, at bæði samgonga og andstøða flyta seg til at vilja breiðar semjur, heldur enn at stara seg blindan í smámunum.

Ein nýggj pensiónsskipan, ið skal vara nógv ár fram, krevur breiða undirtøku í fólkinum. Ein greið støða til ES og NATO má verða breitt forankrað í fólkinum. Síðst men ikki minst, má ein nýggj skipan millum Føroyar og Danmark verða breitt grundað í føroyska fólkinum. Tað ber snøgt sagt ikki til at fáa varandi semjur í hesum málum, uttan minst tríggir stórir flokkar taka undir við tí, ið verður avgjørt. Og fyri at hetta skal bera til vilja vit endurtaka, at gamlar stríðsøksir mugu jarðleggjast og er okkara boð, at formenninir í teimum stóru flokkunum mugu seta seg í einrúm og seta út í kortið eina nýggja tíð fyri Føroyar, sum hevur breiða undirtøku í fólkinum. Til tess má gamalt agg leggjast á hillina og dialogurin frá øllum síðum byggja á virðing hvør fyri øðrum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Naturen – det billige skidt

**Hans Jensen**
*Hvalvik*

I Hvalvik-Streymnes har vi i årevis kæmpet med et stort miljømæssigt problem: Ósanum mellem Hvalvik og Streymnes.

Dette stykke billige natur har i århundrede knækket ryggen på mangen god mand. Først blev det ryddet for sten, drænet, gødet og så voksede der Gud hjælpe mig helt umotiveret græs op, der med møje og ofte i øsende regnvejr skulle og stadig skal slåes. Dette plagsomme ideoti har haft en tendens til at gentage sig år efter år.

Mange brave mænd har mistet livet i de rituelle Klanmord om retten til hver millimeter jord, skelpæle er flyttet frem og tilbage om natten, retsager er ført og konflikter, der får Mellemøsten til at blegne, ligger stadig og ulmer.

Om våren ligger voksne mænd, med fare for liv og helbred, på knæ og lægger kartofler ned. Direkte sundhedsfarligt, men givtigt. Det frugtbare land, velgødet af Bugtens samlede lokummer giver god høst og en meget særegen aroma på stille sommeraftener – men helt ærlig – når man nu kan købe pæne sterile celofanpakkede kartofler i Inn?

Endvidere er Ósanum legeplads for Bugtens børn. Uhørt! For det første er børnene ikke stuerene, når de kommer ind og for det andet, er der ikke et eneste stykke seriøst, arkitekttegnet legetøj til at kvæle ethvert initiativ i fødslen. Der er heller ingen pædagogisk vejledning eller anden manipulation – kort sagt det rene ustrukturerede anarki, der i sidste ende vil resultere i at børnene, når de kommer til skelsår og alder, vil stemme på Folkeflokken eller et andet sted til højre for Solkongen.

Så er der mændene med fluer i hat og hoved, der i timevis står og venter på laksen, de alligevel mister lige inden den kommer på land. Ren kolbøttefabrik. Behøver jeg at nævne det? – ønskelaksen får kunstigt oppumpet, medicinstruttende og tilsat erotisk fristende rødt farvestof i ethvert suppemarket.

Og så er der alle dyrene! At fårene kan købes billigere fra New Zealand, gider jeg slet ikke nævne, de kan trods alt ædes – nej, det er mere alle de totalt unødvendige dyr, hvoraf nogle ganske vist er sjældne. Svaner, hejrer og hjejler. Og trækfulge – bare navnet giver associationer til anden umoral, trækkerdrenge, kvinder, der trækker. Føj! Desuden er der selvfølgelig et utal af discount fugle som strandskader, måger og gråspurve. Fælles for dem alle er, at de griser, når de laver puha på vores nypolerede biler.

Man kan blive ved i samme spor – så derfor er det mig en stor glæde, at vi i vort beskedne kongedømme har fået visionære mænd ved roret, der radikalt har taget fat på problemet og fortsætter den gode særfærøske tradition med at lægge indmarken under betong. Ganske vist vil det nye alderdomshjem kun beslaglægge en 10-15% av Ósanum, men sammen med den nye kirkegård, er det da en hæderlig begyndelse. Det er som bekendt al begyndelse, der er svær, senere glider det lettere, og hvis vi er heldige, vil vort miljøproblem være lagt under asfalt om få år.

Vi må ikke glemme at takke miljøstyrelsen for deres inkompetance og ønske dem fortsat god søvn. Tænk um de var vågnet og havde forstyrret idyllen med tågesnak om unikt miljø, fredning og andre virkelighedsfjerne abstraktioner.

Skynd dig kom – om føje år – Jylland som en kornmark står (H. C. Andersen).

Skynd dig kom – om føje år – Osanum under asfalt ligger (H. J. Jensen).

Nu ser jeg frem til, at jeg om et par år, når jeg døsigt slubrer min morgenkaffe, i stedet for det irriterende fugleliv, vil kunne betragte den fredfyldte røg stige til himmels fra krematoriet i Streymnes. Skulle der drysse lidt støv ned, er det en smal sag for de motoriserede kommunale støvsugere.

# Lánið Eitt Vertshús

**TÍÐINDASKRIV**
*frá Vertshúsinum*

Sum nakað nýtt ber til hjá bólkum av minimum 40 fólkum at lána Vertshúsið hjá Restorff yrkakvøld í November og December frá Kl 24.00 til 05.00. Tað ber til at halda veitslur, dans, osfrs., undir privatum formum. Barrin verður opin við starvsfólki hjá Vertshúsinum. Tað kostar onki at lána Vertshúsið, men verður aldursmarkið 18 ár og skal hvør bólkurin hava ein ábyrgdarpersón sum stendur fyri láninum.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Vertshúsið

Áhugaði kunnu ringja til Anniku á Vertshúsinum á tlf 31 48 47.




**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Gruggut er í dunnuhyli

**Ólavur Rasmussen**



Eitt sindur av roki hevur staðist av, at Katrin Dahl Jacobsen, tingkvinna fyri Javnaðarflokkin, hevur sátt iva um, hvørt tjóðveldisfólk eru nationalsosialistar ella nazistar. Ákæran fall av tingsins røðarapalli í samband við viðgerðina av fíggjarlógini komandi, við atliti at teirri propaganda og villeiðing, sum hon segði Tjóðveldisflokkin setti í verk, tá flokkurin fólkatingsvaldagin proklameraði, at oljan er funnin. Katrin Dahl Jacobsen førdi fram, at tjóðveldisflokkurin hervið nýtir sama framgangsháttt, sum Hitler nýtti, at mála alt ljósareytt, fyri at fyrigykla fólki ein falskan veruleika, so at teir veruligu trupulleikarnir verða fjaldir aftanfyri snildan retorikk.

Nýliga skrivaði Regin Eikholm grein í bløðunum, har hann tekur hesa ákæru til viðgerðar. Regin Eikholm heldur, at ákæran er grov, men ikki órímulig, men heldur eitt "nødvendugt ondi", undirforstaðið, at "med ondt skal ondt fordrives", tí at Tjóðveldisflokkurin hevur verið so ódemokratiskur í síni herferð mótvegis dønum til frama fyri eitt loysingarprojekt, sum bara ein minniluti av føroyingum tekur undir við.

Lat meg straks siga, at eg ikki taki undir við øllum tí sum Tjóðveldisflokkurin borðreiðir við. Eg haldi tað er mín skylda bæði sum valevni og sum veljari, at verða kritiskur, eisini mótvegis mínum egna flokki. Sjálvur var eg aktivur í valstríðnum her í Suðuroynni, og høvdu vit valevni fyri teir ymisku flokkarnar her suðuri, við ørfáum undantøkum, tey allarbestu persónligu viðurskifti við hvønn annan. Ja, eg havi fingið góðar vinir í hinum flokkunum, sum eg annars ikki hevði fingið, tí vit vita innast inni, at flokspolitikkur nu einaferð er flokspolitikkur, og at tað inniber, at vit eru grundleggjandi ósamd um nøkur ting, men eisini grundleggjandi samd um at virða hvønn annan. Og enntá viðhvørt halda at hin hevur rætt, uttan at vit tora at siga tað.

Fyri at halda meg til sakina kann eg viðmerkja, at oljan als ikki var nýtt í valstríðnum í Suðuroynni, tí at partarnir opinbart vóru samdir um, at hetta lættliga kundi elva til misskiljingar og misnýtslu. Eg ivist ikki í, at tá ið Katrin Dahl Jacobsen sigur, at Tjóðveldisflokkurin gav faldara út, har sagt var, at "oljan er funnin", so hevur hon rætt, hóast eg ikki havi sæð henda faldara. Eg kundi gjørt mær tann ómak at kanna hetta sjálvur, men eg tími ikki, tí eg taki Katrina uppá orðið. Og lat meg so í sama viðfangi siga, at eg haldi hetta var blóðskeivt av Tjóðveldisflokkinum. Og er hetta eitt mistak, sum leiðslan í Tjóðveldisflokkinum má taka til eftirtektar. Tað er sum við fluguni í suppuni, kokkurin og eingin annar hevur ábyrgdina. Tað er so skjótt at falla í ta flokspolitisku grøvuna, at misnýta ymisk høvi í einum politiskum valstríði. Eitt mistak, líka so skilaleyst sum tá ið Javnaðarflokkurin í sínari tíð stolt proklameraði: "Gev mær 100 dagar", so eru allir trupulleikar loystir. Eisini hesum mistaki rokni eg við, at kokkurin sjálvur tekur ábyrgdina av.

Tað er 3 høvuðsorsøkir til, at eg skrivi hesa grein. 1) Vit eru øll góð við hetta landið, og vit hava øll bygt land, líkamikið hvønn politiskan lit vit hava. Í so máta hava vit øll okkurt tjóðskaparsinnað í okkum, eins og onnur fólk. 2) Eg havi sjálvur verið prestur í Norðurtýsklandi, har eg havi nógvar góðar vinir, sum eru danskir tjóðskaparmenn, og sum tískil vóru offur fyri nazismuni. Onkur teirra sat enntá í týningarlegu. 3) Eg var sjálvur skírdur nazistur av formanninum í Javnarflokkinum á einum veljarafundi í Sumba.

Eg skal vera tann fyrsti til at viðurkenna, at tjóðskapur ella nationalisma kann vera reinur óndskapur, ja, nationalisman hevur kravt fleiri mannalív og elvt til meira hatur enn nakað annað brigdi í hesum heimi. Vit havt hava tvey heimskríggj, sum eru grundað á vitleysa nationalismu. Í so máta er tankin um eitt felags Europa ella hvat vit rópa tað ein vakur tanki, í hvussu so er á skræðuni. Churchill var ein av teimum fyrstu, sum proklameraði tankan um Europiskt samveldi, tí hann viðurkendi, at nationalisman var farin um alt mark.

Men tjóðskapur kann eisini verða nakað heilt, heilt annað. Eins og vit øll elska okkara børn, hava vit eisini alsk til landið og nøkur felags eyðkenni: Málið, flaggið, matin, siðir og skikkir og so framvegis. Vit kunnu t.d. øll eta ræstan fisk uttan at hata tey, sum eta hundar og tvístertir, tí tað eru tað nøkur fólkasløg sum gera. Og hóast onnur lond hava suverinitet ella sjálvsavgerðarrætt í politiskum viðurskiftum, so hata vit tey ikki fyri tað, eins lítið og vit verða løgd undir hatur, um vit vilja tað sama. Eg havi t.d. stóra virðing fyri teimum donsku tjóðarskaparmonnunum, sum stríddust móti nazismuni og fyri donskum avgerðarrætti á demokratiskum grundvølli, eins og hesir hava stóra virðing fyri okkara vilja at skipa okkum sum sjálvbjargin tjóð. Onkursvegna býr ein felags lagna í okkum øllum somlum, uttan mun til um vit eru týskarar, danir, føroyingar ella okkurt annað. Tíðin, har ein og hvør er sær sjálvum nokk er farin, tað trúgvi eg vit øll eru samd um, meiri ella minni.

Eg havi virðing fyri teimum sum eru ímóti, at Føroyar skipast sum sjálvstøðugt ríki, og sum halda, at tað er skilaleyst at avskriva blokkstuðulin. Og eg haldi tað er beinleiðis skeivt at siga, at blokkstuðulin er rótin til alt ilt í Føroyum. Tvørturímóti hevur peningarenslið úr Danmørk givið okkum høvi til at ment okkum enn meira sum land. Eg haldi enntá at sambandið við Danmark, reint mentunarliga, hevur givið okkum samband við rák úr útlondum, sum vit vóru fátøk uttan. Og persónliga havi eg ikki paranoya mótvegis ES- og Natolimaskapi. Tvørturímóti. Ikki tí, fiskivinnupolitkkurin hjá ES er ikki hepnaður, men vit kenna ikki treytirnar, fyrr enn vit í verki hava roynt tað við samráðingum. Og persónliga meini eg ikki, at ST-limaskapur er ein láturligur viðfáningur í alheimshøpi. Tvørturímóti. Tað er mín sannføring, at avbjálvaða nationalisman, sum hevur myndað europeiskan politikk seinastu øldina, hevur prógvað til fulnar, at vit øll somul mugu taka annað skinn um bak.

Summa summarum. Tað finst eingin ævigur politiskur sannleiki. Sjálvur haldi eg, at fullveldistilgongdin, so klossut sum hon enn er hagreidd av føroyskum polikarum, við væntandi diplomati og væntandi ansi fyri viðkvomu støðu sum eitthvørt land er í, sum er í einum felagsskapi, har eitt land hevur avgerðarrættin fram um onnur, er sprottin av nøkrum heilt øðrum enn onkrum hissini one-mansframførslu, sum tað verður gjørt til í Føroyum. Eg haldi nevniliga, at fullveldistilgongdin í Føroyum beinleiðis er eitt úrslit av teirri globalisering, sum ger seg galdandi í dag. Ikki tí, í meira enn 100 ár hevur sjálvstýrispolitikkur sett dagsskránna her á landi, men lat tað fara. Eg haldi, at føroyingar ásanna meiri og meiri, at heimurin er so samansjóðaður í dag, at avbjóðingarnar eru alt ov stórar til at vit hava ráð til, hvør í sínum lag, at sita við einum ringum smakki í munninum tí vit ákæra hvønn annan fyri líkt og ólíkt í einum høpisleysum dunnuhylja skotbardaga, tí at politikarar í hesum landi eru so sperdir og troyttir, at teir bara kunnu definera seg við at leggja mótstøðufólk undir hatur og illgruna.

Loksins: Á veljarafundi í Sumba dittaði eg mær at siga, í oratoriskum spølni, at frísarnir á sinni ikki høvdu danskan buding í æðrunum tá teir sigu í bjørgunum. Henrik Old og onnur javnaðarvalevni, sambandsvalevni etc. hildu hetta vera sakleyst og stuttligt, tey ristu kanska eitt sindur á høvdinum, eins og tey fingu meg at gera viðhvørt, men ikki formaður Javnaðarflokkins, sum eg annars haldi nógv av, og geri framvegis. Hann samanbar meg við ein nazist. Aftanfyri kulissurnar spurdi eg hann hvat hann bilti sær inn, men hann var hvørki at høgga ella stinga í, segði, at eg byrjaði longu í Hvalba at citera Martin Joensen, um eg ikki visti, at hann var javnaðarmaður. Hann segði einki um, at eg eisini citeraði Poul F.

Á stóra almenna veljarafundinum í sjónvarpinum, har floksleiðarnir í endaliga valstríðnum vardu borg, citeraði formaður Javnaðarfloksins orðarætt úr byrjanini mínari røðu í Hvalba, men gjørdi orðini til síni egnu: "Martin Luther King hevði ein dreym, Martin Joensen hevði ein dreym, Poul F. hevði ein dreym, í Sandvík hava fólk ein dreym, í Sumba hava fólk ein dreym …. o.s. fr."

Eg smíltist. So var eg ikki heilt av leið. Og fegnaðist um, at tað kunnu vera so nógvar orsøkir til, at misskiljingar stinga seg upp. Og var eg ov frekur í Sumba, so skal eg vera tann fyrsti til at taka fluguna úr suppuni, tí tað var ikki illa meint. Men eitt megnaði eg ikki, at taka dreymin frá mínum góða vinmanni, formanni Javnaðarfloksins. Men soleiðis er tað, tí at onkursvegna hava vit eina felags lagnu, um vit eru danir, týskarar, føroyingar, fransmenn - ella bara tveir suðuroyingar, sum vilja tað sama, men hava eitt sindur ilt við at viðurkenna tað.

# Seinastu sýningar av Álvaleiki

**SJÓNLEIKUR**
*Tíðindaskriv*

Nú verður farið undir seinastu sýningarnar av Álvaleiki hjá Hans Andriasi Djurhuus í Sjónleikarhúsinum.

Síðani Havnar Sjónleikarfelag hevði frumframførslu av 73 ára gamla leikinum tann 4. oktober, hava 28 leikara og nógv fólk handan pall spælt 21 sýningar og framførslurnar hava gingið væl. Leikurin hevur fingið góð ummæli, og bæði ung og gomul hava sæð leikin og hava latið væl at, ja onkur, sum er so væl til árs, at tey sóðu leikin, tá hann 1. ferð varð leiktur í Sjónleikarhúsinum í 1930, hevur eisini verið á gátt.

Tað listarliga arbeiði, ið yrkislistafólk hava lagt í pall, búnar og tónleik hevur givið áhugaleikarunum ein fullfíggjaðan karm at virka í, og at hetta hevur kenst inspirerandi, hevur sæst aftur á spælinum.

Royndin við dupultari manning hevur eydnast framúr væl og fleiri áskoðararnir hava nýtt høvi til at síggja leikin meira enn eina ferð fyri at síggja tær ymsu tulkingarnar av leiklutunum.

Álvaleikur er ein familjuleikur, fólk í øllum aldrum kunnu fegnast um skemtiligu søguna og børn, ung, vaksin og golum koma øll heim við sínum serstaku upplivingum.

Seinastu sýningarnar á skránni verða í kvøld og annaðkvøld kl. 19.30 og sunnudagin kl. 16. Atgongumerki fáast í Kunningarstovuni ella við dyrnar.



*Nú verða seinastu sýningarnar av Álvaleiki*